# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Selektiv tjóðveldis-protektionisma

Tjóðveldi hevur síðani 1998 markerað seg sum ein rættiliga liberalan flokk vinnuliga sæð. Flokkurin hevur altíð verið skjótur – javnan ov skjótur - at hiva studningstrøllið frá 80'unum úr hattinum. Tað gav at bíta, tá Tjóðveldi ikki vildi loyva landinum at seta pening í Smyril Line og harvið setti okkara einasta sjóvegis ferðafólkasamband til umheimin í vanda.

Nú er so vent í holuni hjá Tjóðveldi. Nú vil flokkurin við lóg tryggja ein ávísan vinnuaktivitet í Føroyum. Talan er um elektronisku skipaninar hjá bankunum, sum Elektron umsitur.

Hetta tykist óskilligt - og sjálvur í Elektron var frammi í miðlunum og avfturvísti pástandinum hjá Høgna Hoydal og vísti á, at ætlanin hjá bankunum tvørtímóti fer at skapa arbeiðsplás í landinum.

Í mun til t. d. feløg, sum reka sjóvegis ferðafólkaflutning millum Føroyar og útlond, so eru nógvar KT fyritøkur í Føroyum, sum allar liggja í kapping við hvørja aðra og við útlendskar KT fyritøkur.

Hóast bankarnir flyta elektroniskar skipanir av landinum at umsita, so fer brúkarin neyvan at merkja stórvegis mun. Tað er einaferð soleiðis, at bankarnir hava kundar, sum ivalyest helst vilja gjalda minst møguligt fyri sínar bankatænastur.

Tað er ríkiliga dýrt hjá vanliga borgarnum at liva í Føroyum, uttan at landið skal áleggja eykakostnaðir í kraft av óneyðugari protektionismu, sum bara hevur til eindamáls at lívga einari ávísari fyritøku.

Er tað ikki dupultmoralur, tá politikarnir royna at stimbra føroyskan KT útflutning til marknaðir uttanlands, samstundis sum teir vilja løggeva verju til føroyskar KT fyritøkur?

KT í dag er ikki tað sama, sum KT fyri 20 – 30 árum síðani. KT verður í dag veitt allastaðni frá í heiminum frá Bermuda til Taiwan, og tað vildi verið margháttligt, um vit sum lítið fjarskotið oyggjasamfelag skuldu arbeitt fyri KT protektionismu. Um KT protektionisma er politiska málið, so eiga vit bara at rigga av við okkara KT ambitiónum beinanvegin, tí føroyski heimamarknaðurin kann ongantíð vera álitið, um talan skal gerast um eina munandi vinnu.

**Sosialurin**

## Hahahahaha....



**BILL JUSTINUSSEN**
løgtingsmaður

**Nú hevur samgongan kunngjørt eina »avrikslýsing«. Greitt verður frá, hvørji mál, landsstýrissamgongan hevur avrikað, síðani hon varð skipað 26. septembur 2008. Hetta er løgnasta skjal, eg havi lisið í míni tíð sum politikkari. Var landsstýris-samgongan eitt fótbóltslið, sum ein viðhvørt fær fatan av, at tað er, so hevði avrikslýsingin eftir dystin sæð soleiðis út:**

· Allir ellivu møttu til dystin og vóru við upp á tað frá byrjan
· Vit fingu 23 innkast í dystinum, og er hetta fyrstu ferð nakrantíð, at vit hava avrikað so nógv innkast í einum dysti
· Sjey ferðir fingu vit hornaspark, og vit tóku øll sjey hornasparkini í sátt og semju millum allar partar
· Vit framdu 3 útskiftingar, og tað var fult í trá við tað, sum vit høvdu avtalað áðrenn dystin, og kunnu tí staðfesta, at vit hava hildið gjørdar avtalur
· Vit gjørdu 5 fríspørk, men tað gera øll onnur lið eisini
· Málmaðurin skjeyt 16 málspørk, og var tað reint faktisk meiri, enn vit høvdu vónað; enn eitt megnaravrik
· 4 blivu óðir og hóttu við at rýma, men við góðum innsatsi frá øllum, megnaðu vit at varðveita góða stevið allan dystin
· Hóast vit taptu 10-0 hava vit valt at fokusera upp á tað positiva og gloyma tað negativa

Avrikslýsingin hjá landsstýrinum er so full av sjálvsøgdum og náttúrligum »avrikum«, at merkingin av orðinum »avrik« er fullkomiliga oyðilø gd í føroyska málinum. Alla mína tíð hevur man tosað um avrik, tá talan veruliga hevur verið um avrik. At fara upp um morgunin, eta morgunmat, busta tenn og vaska sær, lata hurðarnar aftur eftir sær, tá man fer út osfr. kallast ikki avrik. Tað kallast gerandislív. Nú verður gerandislívið hjá landsstýrinum og umsitingini kallað avrik, og hesi avrik eru nú givin út til lesnað hjá almenninginum.

Avrikslýsingin er soleiðis bygd upp, at hon endurgevur alt samgonguskjalið, og undir hvørjum broti í samgonguskjalinum, har landsstýrið hevur gjørt okkurt, verður avrikið skrivað bæði við reyðum og undirstrikað. Tað høpisleysa er, at mangan er onki samband millum tekstin í samgonguskjalinum og reyða avrikstekstin.

Eitt dømi er á síðu 4. Har stendur fyrst brotið úr samgonguskjalinum um fíggjar- og búskaparmál:

*»Rembingarnar í altjóða og heimliga búskapinum kunnu hava við sær minkandi inntøkur í landskassan. Samgongan miðar tí ímóti at fáa avlop á fíggjarlógina, at føra ein varnan búskapar- og fíggjarpolitik, at tálma sveiggjum í búskapinum og at víðka inntøkugrundarlagið.«*

Avrikslýsingin í sambandi við hetta brotið ljóðar soleiðis við reyðum og undirstrikað:

Fokus er á, at verandi og komandi fíggjarlógir fáa burtur bygnaðarliga hallið, uttan at hetta í ov stóran mun minkar um virksemið í samfelagnum

Bankapakki I og II eru settir í verk fyri at tryggja bankakervið.

Nýggj játtanarskipan er sett í gildi, ið setir nýggjar og sterkari karmar fyri øllum fíggjarlógarar beiðinum.

Legg til merkis, at samgongan longu 26. septembur 2008 visti, at inntøkur landskassans fóru at minka. Tí varð miðað ímóti at fáa avlop á fíggjalógina. Hevur samgongan »avrikað« tað við milliardahalli á fíggjarlógini? Hevur samgongan megnað at tálmað sveiggjum í búskapinum, nú arbeiðsloysið nærkast 10%? Ístaðin fyri at viðganga, at førdi fíggjarpolitikkurin er ein vanlukka, skrivar man bara eina nýggja samgonguorðing um, hvat man fer at fokusera upp á frameftir. Er tað eitt "avrik"? Og so rósar man sær av tveimum bankapakkum, sum eru tveittir í føvning føroyinga úr Danmørkini. Sum í fyrsta umfari hava kostað føroyska samfelagnum 400 mió. krónur. Og síðani dregur man nýggju játtanarskipanina inn sum avrikslýsing. Hóast tað var formansskapur Løgtingsins, sum 16. mars 2005 setti hol á hetta arbeiðið, sum ein embætismannabólkur hevur staðið fyri. Tað løgna er, at hóast hvørki bankapakkar ella játtanarskipan standa nevnd í samgonguskjalinum, verða hesi háláð fram sum politisk "avrik" hjá landsstýrinum.

Eitt annað dømi er á síðu 5. Har stendur í sambandi við orðingina í samgonguskjalinum um, at lætti verður givin við at taka sjúkrakassagjaldið av, at *»lætti er givin við at taka av sjúkrakassagjaldið av«*. Hetta er beinleiðis villeiðing, tí sjúkrakassagjaldið er ikki tikið, tað hevur bara skift navn. Nú eitur tað gjald til Heilsutrygd, men er júst tað sama sum sjúkrakassagjaldið. Og fyri tey flestu er talan um eitt hægri gjald enn frammanundan. At leiðandi politikkarar við løgmanni á odda koma sær at fara so lætt um sannleikan í síni neyð eftir at vísa á okkurt "avrik", sigur alt um politiska veruleikan.

Tað løgnasta er, at »avrikslistin« ikki nevnir eitt einasta av øllum teimum vánaligu avrikum, sum eyðkenna hesa samgonguna. Tilvildarligu og hjálparleysu spariátøkini, sum raka veikastu bólkarnar í samfelagnum verða ikki nevnd við einum orði. Tann avrikslistin hevði uttan iva fylt væl upp í soltna yvirlitinum hjá samgonguni, men tíverri eru teir ikki menn fyri at standa við sín politikk. Onki um sparingarnar á eldraøkinum. Onki um útsettar viðgerðir á landssjúkrahúsinum. Onki um ruðuleikan á økinum børn og ung. Onki um atfinningarnar uttan úr heimi um vantandi fiskivinnupolitikk og burðardygga veiðu. Hví??

Og meðan landsstýrið dusar sær norðri í Gjógv, har skráin er at rósa sær sjálvum og kanska eisini at fyrireika valstríð, økist arbeiðsloysið stútt og støðugt. Fiskivinnu-politikkurin liggur í atgerðarloysi, og úr øllum herðashornum rópa vinnulívsfólk og arbeiðarafeløg eftir einum veruligum politikki. Neyvan fer "avrikslýsingin" hjá samgonguni at flyta fjøll, og neyvan fara "avrikini" at imponera verkafólk, sum standa uttan arbeiði og vinnulívsfólk, sum standa við tómum ordrabókum.

Góði Kaj Leo! Legg frá tær ella skipa aðra samgongu. Nú tørvar okkum politikk, sum er viðkomandi fyri Føroyar og føroyingar, og sum aftur kann flyta okkum fram á leið sum samfelag. Við verandi kós fara vit á húsagang!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.